# 2003



19. AUGUST: Í seks tímar liggur Jack Petersen av Tvøroyri og stríðist fyri lívinum í eini song á Ríkissjúkrahúsinum eftir at verða stungin niður uttan fyri eitt vertshús í Keypmannahavn. Heilar 58 pentur máttu til fyri at seyma hann samanaftur



17. SEPTEMBER: Madonna er smikrað av føroyskari útgávu. Hon sparir ikki lýsingarorðini, tá ið Sosialurin spyr hana, hvat henni dámar, at hennara nýggja barnabók eisini er útkomin á føroyskum. Hon fær stóra skaran av tíðindafólki at flenna, tá hon heldur fyri, at bókin fer at selja eini 50.000 eintøk í Føroyum

18. SEPTEMBER: Mánanáttini eigur 25 ára gamla Linda Hansen úr Gøtu sín fyrsta son – á baksetrinum í bilinum. Tey eru komin til Kollafjarðar, tá tað er greitt, at sonurin ikki vil bíða, og at tey ikki klára á Landssjúkrahúsið. – Alt gekk væl og vit høvdu tað gott alla tíðina, sigur nýggja mamman við Sosialin.





26. SEPTEMBER: Fróði og hini seks fólkini koma frá eini álvarsligari ferðsluvanlukku á Vatnarvegum í Vágum við lívinum. – Vit fingu ein kjans afturat, siga tey við Sosialin eftir skakandi hendingina.



# 2003



9. OKTOBER: Loksins kunnger kongshúsið, at krúnprinsurin, Fríðrikur og Mary Donaldsson, skulu giftast 14.mei 2004. Mary Donaldsson er ættað av oynni Tasmania, og hon og Fríðrikur møttust fyri fyrstu ferð undir olympisku leikunum í Sydney í 2000.



21. OKTOBER: Prædikumaðurin, Christian Hedegård, vitjar oyggjarnar. Møtini hjá honum eru væl vitjað. Fólk eru ymisk á máli um framferðarháttin hjá danska prædikumanninum. Summi halda hann verða pengagrískan, onnur hálova honum.



23. OKTOBER: Línubáturin, Jógvan Norði, søkkur 10 fjóðringar úr Mykinesi. 14 mans rýma frá søkkandi skútuni. Ein leki í maskinrúminum er orsøkin til, at Jógvan Norði søkkur